## Alzheimers-gátan skal granskast

Við alzheimers-sjúkuni verða heilakyknurnar, sum eitt nú stýra minninum, skaddar og doyggja, so hvørt sum sjúkan fær fótin fyri seg. Tað er evropeiska granskingarráðið (ERC), sum hevur latið NTNU-granskaranum Stefan Leutgeb 14 miljónir krónur yvir fimm ár til at granska í orsøkini til alzheimers. Granskingin skal kanna, hvussu alzheimers-sjúkan mennist í heilanum. Tað er serliga økið, sum rópt verður "hippocampus", ið verður rakt. Hetta er økið, har minnið verður til. Í einum heila, sum verður raktur av alzheimers, minkar heilabørkurin, og soleiðis verða økir, sum stýra tonkum, tilrættalegging og minninum skadd. Í staðin setir væta seg á heilan. Granskarar halda, at tann, sum soleiðis gerst minnisveikur av alzheimers-sjúkuni, hevur eina ovurframleiðslu av proteininum "beta-amyloid". Hetta proteinið klumpar seg saman og ger uppsamlingar í heilanum. Rottur verða brúktar í granskingini, og her fara granskarar at gera tað so, at rotturnar framleiða størri nøgdir enn vanligt av "beta-amyloid" í ávísum pørtum av heilanum. Eitt vaksið menniskja hevur umleið 100 miljardir nervakyknur ella "nevronur". Smá elektrisk lødd tekin ferðast um hendan skógin av kyknum og mynda tankar, kenslur og minnið. Tað er í fyrsta lagi hesar "nevronur", sum verða skaddar av alzheimers-sjúkuni. Sum skilst, eru vónir um, at sjúkan í framtíðini kann fyribyrgjast.



Skálafjarðar Sløkkilið:

# Eigur pening til góðar hjá

**- Vit hava fingið ein stóran part av pengunum fyri arbeiði, sum vit gjørdu, tá ið Olshana fórst á Flesjunum, men enn vantar okkum tað, sum Fiskimálaráðið skal borga fyri, sigur Sunleiv Højgaard, brunaumsjónarmaður hjá kommununum við Skálafjørðin**

OLSHANA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hevur tikið langa tíð hjá landsins myndugleikum at rinda sløkkiliðum og øðrum tað, tey eiga til góðar eftir skipsbrotið við Olshanu.

Í fyrsta varð eitt stórt "apparat" sett í gongd til tess at bjarga skipinum, og í øðrum lagi varð nógv reist á føtur fyri at byrgja upp fyri eini dálkingarvanlukku.

Tað eydnaðist ikki at bjarga skipinum, men hinvegin eydnaðist í stóran mun at byrgja uppfyri eini stórari dálkingarvanlukku.

Oljudálkingin gjørdist tíbetur ikki so stór, sum fólk stúrdu fyri, tá ið Olshana fór at leka olju, og hann legðist við lágætt, sum førdi olju inn á Skálafjørðin og norður í Sundalagið. Tá ið ættin seinni skifti, setti olja eisini móti landi aðrastaðni, eitt nú móti Hvítanes-landinum.

### Mistu útgerð

Eitt er, at feløg og einstaklingar løgdu alla sína orku í hetta arbeiði. Annað er, at slíkt arbeiði eisini kostar pening, tí fáur er tann, sum kann brúka tíð, orku og útgerð og ikki fáa hetta endurgoldið.

Eitt av feløgunum, sum eisini mistu útgerð, tá ið Olshana sakk, var Skálafjarðar Sløkkilið, sum misti tríggjar pumpur, ið fórust við skipinum.



*- Fyrsta uppgávan, vit høvdu, tá ið Olshana fór á Flesjarnar, var at pumpa sjógv úr skipinum, men tá ið tað ikki eydnaðist at bjarga Olshanu, og olja fór at leka úr tangunum, gjørdist okkara uppgáva at leggja byrgingar út, taka olju upp og byrgja uppfyri dálking, sigur Sunleiv Højgaard*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Tað er soleiðis, tá ið eitt slíkt skipsbrot hendir, liggur ein partur av ábyrgdini undir innlendismálaráðnum og ein annar partur undir fiskimálaráðnum.

Sunleiv Højgaard, brunaumsjónarmaður hjá kommununum við Skálafjørðin, sigur, at felagið hevur fingið tann partin endurgoldnan, sum liggur undir ábyrgdini hjá innlendismálaráðnum, meðan tann parturin, sum fiskimálaráðið varðar av, enn ikki er goldin, hóast skipsbrotið hendi 2. august í 2007.

### Long bíðitíð

- Tær tríggjar pumpurnar, sum vit mistu, hava vit einki endurgjald fingið fyri. Vit hava keypt okkum pumpur og slangur aftur, og hetta er ein íløga, sum táttar í 400.000 krónur.

Brunaumsjónarmaðurin er onga løtu í iva um, at Skálafjarðar Sløkkilið fer at fáa írestandi peningin, og hann væntar, at útskrivingin av løgtingsvalinum er ein partur av orsøkini til, at hetta hevur drigið so langt út.

- Hetta snýr seg helst um, at játtanir skulu til, og eg trúgvi, at tað er hetta, sum ikki rættiliga er komið upp á pláss.

Sunleiv heldur kortini, at tá ið slíkar uppgávur verða gjørdar fyri tað almenna, átti tað kortini ikki at verið neyðugt at bíða so leingi eftir ágóðanum.

- Okkara partur liggur um 1,2 miljónir krónur, men tá hava vit eisini havt fleiri undirveitarar, sum eisini eiga sín ágóða av hesum.

### Gott samstarv

Hann sigur, at tá ið Skálafjarðar Sløkkilið varð tilkallað, var málið í fyrsta lagi at bjarga skipinum.

- Fyrsta uppgávan, vit høvdu, var at pumpa sjógv úr skipinum, men tá ið tað ikki eydnaðist at bjarga Olshanu, og olja fór at leka úr tangunum, gjørdist okkara uppgáva at leggja byrgingar út, taka olju upp og byrgja uppfyri dálking.

Brunaumsjónarmaðurin sigur, at samstarvið við